# hvørt um annað






Marna Jacobsen, mamma at samkyndari gentu, var ein av trimum røðarum á Vaglinum. Hinir báðir vóru sviin Johan Tiedemann og Finnur Helmsdal



*Finnur Jensen úr Páll Finnur Páll, ið undirhelt við sangi og gittara, spældi millum annað sangin "Eg", sum snýr seg um júst samkynd*



*Finnur Helmsdal (h.m.) segði millum annað í røðu sínari, at Mortan Rasmussen (v.m.) og sonurin Rasmus høvdu goldið dýrasta prísin í stríðnum fyri viðurskiftunum hjá samkyndum í Føroyum*

skrivaði sangin, hevði ikki ímyndað sær, at hann nøkur ár eftir fór at syngja hann á einum tiltaki fyri samkynd. Umframt henda framførdi Finnur Jensen eisini nýggja hittið "Havsins ríki", gamla klassikararn "Herbergið" og loynilagið av útgávuni Førist "Mín egna veg".

## Sjálvandi skrásett parlag

Fyrsta Føroya Pride var í 2005. Finnur Helmsdal gjørdi í røðu sínari greitt, at hann ikki var í iva um, at tað var akkurát tað tiltakið, ið setti gongd á tað, sum nú er hent á økinum í Føroyum. Somuleiðis vísti hann á, at Føroyar eru tað einasta landið í Norðurlondum, har skrásett parlag ikki er loyvt. Tað hóvar ikki manninum, sum saman við Annitu á Fríðriksmørk legði fram uppskotið um broyting av grein 266 b í revsilógini.

– Sjálvandi eiga vit at seta í gildi skrásett parlag í Føroyum! Heldur í dag enn í morgin, staðfesti Finnur Helmsdal, meðan fjøldin fagnaði honum. Finnur Helmsdal sigur tó, at málið ikki er búgvið at royna í tinginum enn, og tí roknar hann ikki við, at hvørki hann ella nakar annar fer at leggja tað fram.

At politikkur er uppi í Føroya Pride, ger hetta tiltak nakað øðrvísi enn líknandi tiltøk aðrastaðni í heiminum, har Gay Pride ofta er ein stór veitsla burtur av. Í Føroyum er Føroya Pride eisini ein veitsludagur, og tí kundi Johan Tiedemann sum fyrsti røðarin skemtiliga og skilagott staðfesta, at "party and politics" ofta gang hond í hond.

Dimmalætting skrivaði í gjár, at ársins Føroya Pride tiltak var minni merkt av politiskum spenningi enn undanfarna tiltak, og at tað helst var orsøkin til, at tiltakið ikki var eins væl vitjað hesaferð. Tað er møguliga ein partur av frágreiðingini, men ein annar partur er tann, at tiltakið var ógvuliga illa upplýst. Eitt nú stóð ongastaðni hvar skrúðgongan leygardagin byrjaði, og ætlaði tíðindafundurin varð avlýstur, tá eingin møtti upp, tí fyrireikarnir høvdu gloymt at upplýst hvar hesin tíðindafundurin skuldi vera. Tað er heilt einfalt ov vánalig fyriskipan!

## Moralskar krimpireyvar

Skal mátast eftir fagnaði, látri og lógvabrestum, helt Marna Jacobsen bestu røðuna á Føroya Pride.

– Øll vit tilkomnu kenna Pride. Men tað er ikki hesi ferju, vit heiðra í dag hóast hon hevur tænt væl, legði hon skemtiliga fyri, áðrenn tónin gjørdist nakað hvassari. Hon legði eftir teimum, hon kallaði moralskar krimpireyvar og sýtti fyri, at hesar skulu umboða hana.

Bíblian hevur ofta verið nýtt sum argument í kjakinum, og hetta fekk Marnu Jacobsen at nevna Paulus, sum skrivaði hópin av brøvum til fólkabólkar og greiddi teimum frá, hvussu tey áttu at liva.

– Og í Føroyum eru tað so nógv sum eita Paulus og vita betur enn onnur, hvussu vit skulu liva, soleiðis at vit passa inn í fýrakantaða kassan, har "normaliteturin" býr, helt hon fyri.

Tiltakið á Vaglinum endaði við, at tjóðsangurin varð sungin.